Tryggingareftirlitið

**Tórshavn 23. desember 2010**
Journalnr.: 10/00298

**Til tryggingarfeløg, eftirlønargrunnar og haldfelagsskapir, umframt uttanhýsis grannskoðarar og ábyrgdarhavandi tryggingarfrøðingar hjá hesum feløgum og grunnum.**

Jólabræv 2010 um viðurskifti, ið tryggingarfeløg, eftirlønargrunnar, haldfelagsskapir, uttanhýsis grannskoðarar og ábyrgdarhavandi tryggingarfrøðingar eiga at vera varug við í 2011.

Við hesum sendir Tryggingareftirlitið jólabræv 2010 við upplýsingum um, hvat leiðslurnar í tryggingarfeløgum og eftirlønargrunnum, uttanhýsis grannskoðarar og ábyrgdarhavandi tryggingarfrøðingar serliga eiga at vera varug við í 2011.

Umframt nevndu viðurskifti í jólabrævinum skulu sjálvandi allar ásetingar í løgtingslóg nr. 55 frá 9. juni 2008 um tryggingarvirksemi (tryggingarlógin) og reglur ásettar við heimild í lógini haldast.

## 1. Freistir

Tryggingareftirlitið kann tíanverri aftur í ár staðfesta, at einstøk tryggingarfeløg og eftirlønargrunnar ikki halda tær freistir, sum eru ásettar at lata inn ársfrásøgn, hálvársfrásøgn, solvensfráboðan, fráboðan um skrásettar ognir umframt frágreiðing frá ábyrgdarhavandi tryggingarfrøðingi.

Freistirnar, fyri nær nevndu upplýsingar skulu vera latnar Tryggingareftirlitinum í seinasta lagi, eru ásettar greitt í lóg og kunngerð. At ásettu freistirnar ikki verða hildnar má sostatt metast sum tekin um vánaliga leiðslu.

Um einstøk trygginarfeløg og eftirlønargrunnar aftur í 2011 ikki halda tær ásettu freistirnar fer Tryggingareftirlitið at seta revsiatgerðir í verk mótvegis hesum feløgum og grunnum.

## 2. Upplýsing um dagfesting av nevndarfundinum, har ársfrásøgnin fyri 2010 verður góðkend

Sambært § 122, stk. 1 í tryggingarlógini skal ársfrásøgnin í tí líki, hon er víst fram og góðkend av nevndini, sendast Tryggingareftirlitinum í tveimum eintøkum uttan ógrundaðan steðg aftaná tann nevndarfundin, har ársfrásøgnin er endaliga góðkend.

Eftirlitið skal við hesum biðja tryggingarfeløgini og eftirlønargrunnarnar um innan 15. januar 2011 at upplýsa nær nevndarfundurin verður hildin.

## 3. Ásetingar, ið eru galdandi fyri gerð av ársfrásøgn fyri 2010 og hálvársfrásøgn

Gjørt verður vart við, at ársfrásøgnin fyri 2010 skal gerast sambært ásetingunum í kapittul 13 í tryggingarlógini og kunngerð nr. 2 frá 30. desember 2009 um ársfrásagnir hjá tryggingarfeløgum og haldfelagsskapum.

Serliga verður gjørt vart við, at sambært § 2 í nevndu kunngerð skulu tryggingarfeløg, eftirlønargrunnar og haldfelagskapir gera hálvársfrásøgn. Hálvársfrásøgnin skal gerast fyri hálvárið 1. januar - 30. juni 2011 og sendast til Tryggingareftirlitið í seinasta lagi 31. august 2011, sbrt. § 145, stk. 7 í kunngerðini. Hálvársfrásøgnin skal vera tøk alment sama dag á t.d. heimasíðu hjá felagnum ella við at venda sær til felagið. Ásetingarnar um at gera hálvársfrásøgn eru at finna í § 145 í kunngerðini.

## 4. Innsending av ársfrásøgn, uttanhýsis grannskoðanarprotokoll viðvíkjandi ársfrásøgnini fyri 2010

Sambært § 122, stk. 1 í tryggingarlógini skal ársfrásøgnin í tí líki, hon er víst fram og góðkend av nevndini, sendast Tryggingareftirlitinum í tveimum eintøkum uttan ógrundaðan steðg. Tey tvey eintøkini skulu latast Tryggingareftirlitinum í seinasta lagi 2 dagar aftaná tann nevndarfundin, har ársfrásøgnin er endaliga góðkend. Saman við ársfrásøgnini skal grannskoðanarprotokoll frá uttanhýsis grannskoðaranum sendast Tryggingareftirlitinum, sbrt. § 122, stk. 2.

Ársfrásagnir fyri ávikavist lívstrygging, skaðatrygging og samtøkur kunnu takast niður sum excel fílur á heimasíðuni hjá eftirlitinum www.tryggingareftirlitid.fo.

Felagið ávikavist eftirlønargrunnurin verða biðin um at senda eftirlitinum teldutøkt avrit av ársfrásøgn, excel fílu og grannskoðanarprotokoll á teldupostadressuna: tryggingareftirlitid@tryggingareftirlitid.fo.

## 5. Innsending av grannskoðaðari og av aðalfundinum góðkendari ársfrásøgn

Sambært § 123, stk. 1 í tryggingarlógini skal grannskoðaða og góðkenda ársfrásøgnin sendast Tryggingareftirlitinum í trimum eintøkum, uttan ógrundaðan steðg aftaná endaliga góðkenning. Tey trý eintøkini skulu latast Tryggingareftirlitinum í seinasta lagi 2 dagar aftaná tann aðalfundin, har ársfrásøgnin er endaliga góðkend, og í seinasta lagi 4 mánaðir aftaná, at roknskaparárið er endað, t.e. í seinasta lagi 1. mai 2011.

Felagið ávikavist eftirlønargrunnurin verða biðin um at senda eftirlitinum teldutøkt avrit av ársfrásøgnini og excel fílu á teldupostadressuna: tryggingareftirlitid@tryggingareftirlitid.fo

## 6. Ársfrásøgn v.m. sum excelfílur

Eins og víst á undir pkt. 4 kunnu ársfrásagnir takast niður sum excel fílur av heimasíðuni hjá eftirlitinum www.tryggingareftirlitid.fo.

Talan er um hesar excel fílur:

a. Ársfrásøgn fyri lívstrygging við fíggjarstøðu, rakstrarroknskapi og 5-árayvirlit yvir høvuðs- og lyklatøl.

b. Ársfrásøgn fyri skaðatrygging við fíggjarstøðu, rakstrarroknskapi og 5-árayvirlit yvir høvuðs- og lyklatøl.
c. Ársfrásøgn fyri samtøkur við fíggjarstøðu og rakstrarroknskapi.

Tey nevndu excel rokniørkini skulu eisini nýtast í sambandi við ger av hálvársfrásøgn.

Samtøkur, har skaðatrygging er ein minni partur, kunnu nýta rakstrarroknskapin fyri lívstrygging

Samtøkur, ið bara reka lívstryggingarvikrsemi, kunnu nýta bæði fíggjarstøðu og rakstrarroknskap fyri lívstrygging.

Gjørt verður vart við, at samanberingartøl skulu gerast fyrstu ferð í sambandi við ársfrásøgn fyri 2011. Tó er møguligt at gera samanberingartøl í sambandi ársfrásøgnina 2010.

Somuleiðis verður gjørt vart við, at 5-árayvirlitið skal gerast fyrstu ferð fyri roknskaparárið 2011, sbrt. § 147, stk. 2 í kunngerðini. Tó er møguligt at gera 5-árayvirlitið í sambandi við ársfrásøgnina 2010.

**7. Dótturfeløg, ið ikki eru tryggingarfeløg**

Sambært § 123, stk. 3 í tryggingarlógini skulu dótturfeløg, ið ikki eru tryggingarfeløg, innsenda 1 eintak av ársfrásøgnini, samstundis sum tryggingarfelagið innsendur 3 eintøk av síni ársfrásøgn, sí pkt. 5.

Felagið verður biðið um at senda eftirlitinum teldutøkt avrit av ársfrásøgnini á teldupostadressuna: tryggingareftirlitid@tryggingareftirlitid.fo

**8. Serstakar upplýsingar í sambandi við innsending av ársfrásøgn sambært pkt. 5 omanfyri**

Í sambandi við innsending av ársfrásøgn fyri 2010 verða feløg og eftirlønargrunnar biðin um at upplýsa um broytingar í hesum leiðreglum vm.:

a) Starvsskipanini hjá nevndini, sbrt. § 50 í tryggingarlógini
b) Skrivligar leiðreglur fyri høvuðsvirksemi, sbrt. 55 í tryggingarlógini.
c) Lýsing av leiðreglum, mannagongdum, eftirlitsmannagongdum og eftirlits- og trygdartiltøkum á KT-økinum, sbrt. § 56 í tryggingarlógini og vegleiðing nr. 3 frá 15. desember 2008 um § 56, stk. 1, nr. 1-5, í løgtingslóg um tryggingarvirksemi umframt vegleiðing nr. 4 frá 15. desember 2008 um eftirlits- og trygdartiltøk á KT-økinum sambært § 56, stk. 1, nr. 4 í løgtingslóg um tryggingarvirksemi.
d) Upplýsing um hvørji starvsfólk, ið ikki uttan loyvi frá stjórnini kunnu eiga ella reka sjálvstøðuga vinnufyritøku, og um stjórnin hevur givið loyvi til at eiga ella reka sjálvstøðuga vinnufyritøku, og til hvørji starvsfólk hetta loyvi er givið, sbrt. § 64, stk. 2 og 3 í tryggingarlógini.
e) Leiðreglur fyri í hvønn mun upplýsingar verða latnar víðari. Hesar leiðreglur skulu vera alment atkomuligar við t.d. at liggja á heimasíðuni hjá tryggingarfelagnum ávikavist

eftirlønargrunninum. Um tryggingarfelagið ella eftirlønargrunnurin ikki hevur nakra heimasíða, skal eitt eintak vera til taks á kontórinum hjá felagnum ella grunninum, sbrt. § 79 í tryggingarlógini.

f) Leiðreglur hjá stjórnini um at gera eina skrá til tess at skráseta ognir, og um hvussu skráin verður førd, sbrt. § 5 í kunngerð nr. 1 frá 14. oktober 2009 um skráseting av ognum.
g) Mannagongdir hjá nevndini um leypandi dagføring av teirri í pkt. f nevndu skrá, sbrt. § 6 í kunngerð nr. 1 frá 14. oktober 2009 um skráseting av ognum.

Felagið ávikavist eftirlønargrunnurin verður somuleiðis biðin um at senda eftirlitinum broytingar í teimum undir pkt. a – g nevndu skjøl teldutøkt á teldupostadressuna: tryggingareftirlitid@tryggingareftirlitid.fo

**9. Haldfelagsskapir**

Sambært § 2 í tryggingarlógini eru somu ásetingar galdandi fyri haldfelagsskapir eins og fyri tryggingarfeløg. Hetta merkir, at pkt. 1-6 og 8 omanfyri eisini eru galdandi fyri haldfelagsskapir. Serliga verður gjørt vart við, at viðvíkjandi pkt. 3 og 8 skulu einans tey høvuðs- og lyklatøl umframt skjøl, ið eru viðkomandi fyri haldfelagsskapin, latast inn.

**10. Frágreiðing frá ábyrgdarhavandi tryggingarfrøðingi**

Fyri lívstryggingarfeløg og eftirlønargrunnar skal Tryggingareftirlitið hava móttikið avrit av frágreiðingini frá ábyrgdarhavandi tryggingarfrøðinginum til nevndina í seinasta lagi 10 dagar eftir, at ársfrásøgnin er góðkend av aðalfundinum, sbrt. § 7, stk. 7 í kunngerð nr. 7 frá 15. desember 2008 um ábyrgdarhavandi tryggingarfrøðing.

Sambært § 8, stk. 2 í kunngerðini skal eftirlitið hava móttikið árligu frágreiðingina frá ábyrgdarhavandi tryggingarfrøðingi í seinasta lagi 1 mánaða aftaná at ársfrásøgnin er góðkend av aðalfundinum.

Teldutøkt avrit av frágreiðingini frá ábyrgdarhavandi tryggingarfrøðingi skal sendast á teldupostadressuna: tryggingareftirlitid@tryggingareftirlitid.fo

**11. Serstakar upplýsingar i grannskoðanarprotokoll hjá uttanhýsis grannskoðara viðv. ársfrásøgnini**

Uttanhýsis grannskoðarin skal í grannskoðanarprotokollini serliga upplýsa um, broytingar í starvsskipanum, mannagongdum og fyriskipanum v.m., sum nevndar eru í tryggingarlógini og kunngerðum við heimild í lógini. Somuleiðis skal upplýsast um hvørjar, ið ikki eru gjørdar og settar í verk í tryggingarfelagnum og/ella eftirlønargrunninum.

Grannskoðarin skal viðmerkja, hvørja tíðarætlan leiðslan í felagnum og/ella grunninum hevur upplýst fyri at gera og seta í verk tær manglandi starvsskipanirnar, leiðreglurnar, mannagongdirnar og fyriskipanirnar.

Uttanhýsis grannskoðarin skal harumframt upplýsa í grannskoðanarprotokollini, um gjørdar eru innanhýsis samtøku skuldbindingar við onnur enn dótturfeløg. Um Tryggingareftirlitið hevur

givið loyvi til tílíkar skuldbindingar, skal grannskoðarin ansa eftir, at skuldbindingin/skuldbindingarnar eru innan fyri markið, ið eftirlitið hevur givið loyvi til.

Um innanhýsis samtøku skuldbindingar eru gjørdar við onnur enn dótturfeløg, uttan loyvi frá Tryggingareftirlitinum, skal upplýsast um hetta í grannskoðanarprotokollini.

**12. Fráboðan um solvens**
Tryggingarfeløg og eftirlønargrunnar skulu boða Tryggingareftirlitinum frá solvens og individuellum solvenstørvi á TB oyðublaði hvønn ársfjórðing, sbrt. § 5, stk. 9 í kunngerð nr. 1 frá 15. mars 2010 um gjaldføri (solvens) og rakstrarætlanir hjá tryggingarfeløgum, t.e. í seinasta lagi, 1. mai, 1. august, 1. november og 1. februar.

Fráboðanin skal sendast Tryggingareftirlitinum teldutøk á teldupostadressuna: tryggingareftirlitid@tryggingareftirlitid.fo

Felagið ávikavist eftirlønargrunnurin verða biðin um bara at senda ta einu fráboðanina, og skal hetta vera ein røtt uppgjørd fráboðan.

Uppgerðin av individuella solvenstørvinum skal vera skrivliga skjalprógvað, sbrt. vegleiðing nr. 1 frá 13. apríl 2010 um at gera upp individuellan solvenstørv pkt. 8.

Um tryggingarfelagið ávikavist eftirlønargrunnurin ikki lýkur individuella solvenstørvin, ið uppgjørdur er av leiðsluni, skal hetta beinanvegin fráboðast Tryggingareftirlitinum av leiðsluni í felagnum/eftirlønargrunninum, sbrt. § 59 í tryggingarlógini og av grannskoðaranum hjá felagnum/eftirlønargrunninum, sbrt. § 128 í tryggingarlógini.

**13. Fráboðan um skrásettar ognir og tryggingarligar avsetingar og avsetingar til eftirlønir o.a.**
Sambært § 8 í kunngerð nr. 1 frá 14. oktober 2009 um skráseting av ognum hjá tryggingarfeløgum skulu øll tryggingarfeløg og eftirlønargrunnar lata inn uppgerð yvir samlaðu tryggingarligu avsetingarnar ávikavist avsetingar til eftirlønir o.a. og uppgerð yvir skrásettar ognir til fulnað fyri avsetingarnar. Fráboðanin skal latast inn í seinasta lagi ein mánaða eftir hvønn ársfjórðing, t.e. 1. mai, 1. august, 1. november og 1. februar.

Oyðiblað at nýta í sambandi við uppgerðina er at finna á heimasíðuni hjá Tryggingareftirlitinum: www.tryggingareftirlitid.fo

Felagið ávikavist eftirlønargrunnurin verða biðin um bara at senda ta einu fráboðanina hvønn ársfjórðing, og skal hetta vera ein røtt uppgjørd fráboðan.

**14. Hvítvask**
Gjørt verður vart við at ásetingarnar í løgtingslóg nr. 56 frá 9. Juni 2008 um fyribyrgjandi tiltøk ímóti hvítvaski av vinningi og fígging av yvirgangi, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 56 frá 26. mai 2010 (hvítvaskløgtingslógin) eisini eru galdandi fyri lívstryggingarfeløg og eftirlønargrunnar.

Sambært § 3, stk. 1 í hvítvaskløgtingslógini verða §§ 3 og 6-30 og § 35 í "lov om forebyggende foranstaltninger mod hvidvask af udbytte og finansiering af terrorisme", sum lógin er sett í gildi við kongligari fyriskipan[1], nýttar tilsvarandi upp á lívstryggingarfeløg og eftirlønargrunnar, við teimum frávikum, sum eru ásett í hvítvaskløgtingslógini.

Serliga verður gjørt vart við ásetingar um í kongligu fyriskipanini um:

a) Undersøgelses- og underretningspligt, sbrt. §§ 6 og 7.
b) Legitimation m.v., sbrt. § 11.
c) Faste kundeforhold, sbrt. § 12.
d) Skærpede krav til legitimation m.v., sbrt. § 19.
e) Opbevaring af identitetsoplysninger m.v., sbrt. § 23.
f) Interne regler og uddannelse m.v., sbrt. § 25 og
g) Tavshedspligt og ansvar.

Skrivligu innanhýsis reglurnar í § 25 um “kundelegitimation, indberetning, opbevaring af registreringer, intern kontrol, risikovurdering, risikostyring, ledelseskontrol og kommunikation samt uddannelses- og instruktionsprogrammer for medarbejderne for at forebygge og forhindre hvidvask og terrorfinansiering” sambært pkt. f skulu latast Tryggingareftirlitinum saman við ársfrásøgnini fyri 2010 í seinasta lagi 1. mai 2011.

**At enda**

Tryggingareftirlitið kann kunna um, at ætlandi verða leiðslurnar í tryggingarfeløgum og eftirlønargrunnar aftur kallaðar til fundar í 2011 at viðgera viðkomandi viðurskifti í hvørjum einstøkum tryggingarfelagi ávikavist eftirlønargrunni. Á dagsskrá verða fyrst og fremst roknskaparlig viðurskifti og kapitalviðurskifti.

Tryggingareftirlitið skal við hesum nýta høvi til at ynskja øllum móttakarum av hesum brævi gleðilig jól og eitt gott nýggjár, har øll gera sína skyldu og halda tryggingarlógina og ásetingar við heimild í lógini, undir hesum tíðarfreistirnar at lata eftirlitinum tilfar.

Vegna Tryggingareftirlitið

Jógvan Thomsen
stjóri

Gudmundur E. Nónstein
fulltrúi

---

[1] Anordning nr. 79 frá 26. Januar 2010 om ikrafttræden for Færøerne af lov om forebyggende foranstaltninger mod hvidvask af udbytte og finansiering af terrorisme